**Harry og Hanna Wilson:**

# Olaf Olsen varð bumbaður í Dunkerque

**Vit eru nú komin til triðja og seinasta part av frásøgnini hjá Honnu og Harry Wilson. Teirra lív kom at gerast nógv øðrvísi, enn tað varð sungið við teirra vøggu. Hetta kom Hitler at broyta fullkomiliga. Men tey hava havt eitt gott lív, og her verður greitt frá tí felags føroyska/bretska samleikanum, sum tey eru góð umboð fyri**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

**3. partur**

### Syd kom aftur eftir gentuni

Sum vit vita, førdi kríggið til nógv samband millum bretar og føroyingar og eisini til nógv hjúnarløg.

Dóttir Jens Reinert, mammubeiggja Honnu, Gretchen, giftist eisini í Bretlandi, og hana hava vit sæð nokk so nógv. Maðurin var Oliver Dean, vanliga nevndur Dixie. Hann er upprunaliga frá Norðuronglandi, men flutti í 1930-unum, sum ungur maður til Birmingham, har hann sóknaðist eftir arbeiði. Hann var í Føroyum í 1940. Dixie var ein av teimum, sum var evakueraður frá Dunkerque.

Villbjørg, dóttir Jens, giftist við Syd Pike. Hann var sjómaður, og hevur eina áhugaverda søgu. Áðrenn týskarar tóku Danmark, kom hann við einum trolara til Suðuroyar, tí eitt týskt flogfar var dottið niður har. Teir komu eftir hesum týska flogfarinum. Hetta skuldi ikki koma alment fram, tí Danmark var tá uttanveltað. Manningin á flogfarinum varð hildin aftur í Havn, og fór av landinum beint áðrenn Danmark varð hersett. Ein av teimum, sum ansaði eftir hesum týskarum, var Johan Norðfoss, sum vit høvdu ein grein um nú í heyst.

Syd fór til Fjareystur, og hann segði seg vilja koma aftur at giftast við Villbjørg. Øll søgdu, at hann fór ikki at koma aftur. Men hon bíðaðu í tolni, og hann kom. Tey giftust í Havn í mars 1946. Nú búgva tey í Canada.



*Louis Wilson saman við konu síni Connie*

### Olaf Olsen var við í Dunkerkque

Vit kendu ein mann í Grimsby, Olaf Olsen, sum eisini hevur upplivað sín part av søguni frá bardaganum. Hann var føddur í Grimsby av føroyskum foreldrum. Tey vóru Christina og Óli Olsen, í Króki, av Sandi. Olaf giftist eftir kríggið við Selmu, dóttir Margrethu og Poul í Lon úr Vestmanna. Hann hevði verið í Føroyum undir fyrra heimsbardaga.

Seinni hevur hann verið havnameistari í Gloustershire vestantil í Onglandi. Vit hittust á sjómansmissiónini í Grimsby til eina jólasøla. Hann dugdi framvegis væl at tosa føroyskt.



*Sanna og Louis Apol, sum eru upprunin til hesa søgu*

Tað áhugaverda er, at Olaf upplivdi evakueringina úr Dunkerque, sum vit greiddu frá í fyrsta parti. Tað er eisini greitt frá hesi hending í Teir sigldu úti, 1. bók, hjá Niels J. Arge.

Tá seinni heimsbardagi brast á, var Olaf 2. stýrimaður á einum ferðamannaskipi, sum sigldi á rutuni millum Ongland og Frankaríki. Hetta skip sigldi ikki minni enn 22 fjórðingar um tíman.

Sum bardagin brast á sunnudag fóru teir mánadag við fullum skipi av herfólki, einum 1.000 monnum, úr Southampton sunnast í Onglandi til Le Havre í Fraklandi. Tá ið teir komu aftur haðani týsdagin, tók herurin skipið, ið varð bygt um til hospitalsskip.

Olaf var eina tíð við sama skipi. Tá ringast stóð til, var hann tríggjar ferðir í Dunkerque, og teir førdu 1.600 særdar hermenn aftur úr franska býnum Dunkerque, tá ið bretski herurin hopaði undan týskarum.

Men har blivu nógvir eftir, og Olaf segði, at hetta vóru ringastu dagar í lívi hansara.

Seinastu ferðina, teir komu inn móti Dunkerque, var luftin full av flogførum, bumbur vóru tveittar alla tíðina, og alt var svart í royki og eldi. Eisini skipið, Olaf var við, varð álopið, og 10 flogfør av slagnum Stuka skutu eftir teimum við maskinbyrsum og sleptu bumbur eftir teimum.

Teir fóru út um eina løtu og sigldu so inn aftur í havnina millum vrakini, ið har lógu. Tá ið teir komu til keiina sóust sjúkrabilar, so langt sum eygað sá. Teir skundaðu sær at taka menninar umborð, áðrenn tað fór at lýsa fyri degi. Tá ið teir fóru avstað aftur var ein bretskur oyðari har úti fyri. Hann sigldi á eina minu og fór í spønir.

Teir kundu ikki taka teir 2-300 menninar, sum fóru á bláman, upp úr sjónum. Tað bar ikki til at drála so leingi, at tað fór at lýsa, áðrenn teir sjálvir komu úr vandanum. Teir vistu nevniliga, at týskarar tá fóru at vera uppi yvir við sínum flogførum. Teir høvdu eisini sannað, at týskarar eirdu heldur ikki hospitalskipum, hóast tey vóru væl og virðiliga merkt við Reyða Kross merki.

Eingin bumba rakti skipið, tá ið teir vóru álopnir, men merkini frá spreingikúlunum, sum høvdu borið við skipið, vóru mong, og



*Olaf Olsen var bumbaður við Dunkerque og endaði seinni í japanskari fangalegu*